# Túrfrágreiðing - *Magnus Heinason*: Svartkjaftur sunnanfyri, túrur 1410, 27/3-9/4 2014

**Fólk frá HAV:** Jan Arge Jacobsen, Leon Smith, Jens Arni Thomassen og Poul Vestergaard

**Ábyrgd:** Jan Arge Jacobsen

**Endamál:** At kanna nøgdirnar av svartkjafti sunnanfyri Føroyar og í norðara parti av gýtingarøkinum. Ekkokanningin er skipað sum altjóða kanning undir ICES, har Føroyar luttaka saman við Noregi, Írlandi, Hollandi og Russlandi. Noreg var tó ikki við í ár. Hini skipini hava kannað økini longri suðuri.

**Reiðskapur:** Svartkjaftatrol (flótitrol). CTD og WP2 glúp. Scanmar og Marport útgerð at máta trolið.

**Um túrin:** Farið varð suðureftir á norðastu kósina, ið skuldi takast (**Mynd 1**). Tá vit sigldu eysturyvir á syðstu siglingarleiðini, møttu vit hinum skipunnum, ið komu sunnanífrá. Hesi vóru um at verða liðug við teirra part, samstundis sum vit vóru lidnir. Veðrið var hampiligt meginpartin av túrinum.

Hita- og saltmátingar vórðu tiknar við CTD frá vatnskorpuni niður á botn, ella niður á 1.000 m, um botndýpið var djúpari enn 1.000 m. Ætikanningar vórðu gjørdar við einum WP-2 planktonglúpi frá 200 m. dýpi upp í vatnskorpuna. Nøgdin av svartkjafti varð mátað við ekkóloddi (ekkóintegratori), sum síðani varð roknað um til tons av fiski. Trolað varð javnan, fyri at greina sundur ekkóskriftina undir kanningunum.

Svartkjaftur

Fyribilsúrslitini vísa, at nógv av smáum svartkjafti stendur í føroyskum øki. Hetta er 1-3 ára gamal fiskur, sum er óbúgvin. Tann búni svartkjafturin, ið hevur gýtt longur suðuri, er enn ikki komin norður í føroyskt øki.

Tað var umleið sama nøgd av svartkjafti í okkara kanningarøki í ár, sum í fjør. Kanningarnar hjá Magnusi Heinasyni kunnu tó ikki brúkast einsamallar til at vísa nøgd av svartkjafti. Samlaða nøgdin, har tølini frá øllum rannsóknarskipunum verða við, verður roknað síðst í mánaðinum.

Tað vísir seg, at svartkjafturin var smærri norðan fyri Wyville-Thomson Ryggin enn sunnan fyri. Tann smái og óbúni svartkjafturin, millum 14-36 cm. (mest 1-3 ára gamal fiskur), var serliga at síggja rundan um bankarnar vestanfyri og frá Munkagrunninum og suður á Ryggin, meðan tann størri og búni svartkjafturin var at síggja nakað syðri, sunnan fyri bankarnar og báðumegin markið. Hesin fiskurin hevði gýtt, helst longur suðuri, og var á veg norðureftir aftur. Ein sera lítil partur av svartkjaftinum í okkara øki hevði enn ikki gýtt.

Ekkóskriftin av svartkjafti er víst í **Mynd 2** og **3**. Svartkjafturin stóð á 400-500 m. dýpi, har hann vanliga plagar at standa. Samlaða nøgdin av svartkjafti í gýtingarøkinum verður roknað út á fundi á Havstovuni beint eftir páskir (22-25 apríl), har tølini frá øllum skipunum vera við.

Longdarbýtið av svartkjafti er víst í **Mynd 4**. Miðallongdin í kannaða økinum liggur um 22 cm. og miðalvektin um 82 g, men hesi tølini siga ikki so nógv um aldursbýtið, av tí at talan er um fleiri toppar í longdarbýtinum: Fyrsti toppurin um 18 cm. er eitt ára gamal fiskur (2013

árgangurin), meðan næsti toppurin á 25 cm. er helst trý ára gamal fiskur (2011 árgangurin). Blandað við nakað av tvey ára gomlum fiski. Fýra ár og eldri fiskur er frá 28 cm. og uppeftir. Sum **Mynd 4** vísir, var nógv til av eitt ára gomlum svartkjafti. Hetta er sum nevnt 2013 áragangurin. Árini fyri hava vit sæð 2009, 2010 og 2011 árgangirnar í kanningunum, og um 2013 árgangurin eisini kemur fyri seg, eru bjørt útlit fyri svartkjaftastovninum komandi árini.

Av tí at tann smærri óbúni svartkjafturin stóð norðanfyri tann eldra fiskin, sæst eitt rættari bílæt av støddini í **Mynd 5**, har miðalvektin av svartkjafti fyri hvørt hál er víst. Okkurt av føroysku skipunum lá suður móti markinum, saman við íslendingum og russarum. Hesi skipini sloppu inn í ES sjógv at fiska um mánaðarskiftið, so tey rýmdu úr føroyskum øki fyrst í apríl suður í ES sjógv, har tann størri svartkjafturin er.

Makrelur
Eingin makrelur varð fingin á túrinum.

Lakssild og prikkafiskur
Lakssild var at síggja sum smáar torvur ella sum ein samanhangandi lind. Um náttina sást lakssildin tætt við vatnskorpuna og um dagin niður á 300 metra dýpi. Djúpari, á 300-450 m. dýpi, stóð prikkafiskur, men hann var sera spjaddur og sást sum tunt støv á ekkóskriftini.

Æti
Krill var at síggja í mestsum øllum økinum á 400-700 metra dýpi, meðan lítið av æti var í ovaru løgunum. Tað er frá vatnskorpuni og niður á 200 m.

Hydrografi
Hitin í vatnskorpuni var millum 7-9°C í kanningarøkinum (**Mynd 6**.)

**Sýnistøka:** Trolað varð javnan fyri at greina sundur ekkóskriftina undir kanningunum, og 337 nytrur til aldursgreining av svartkjafti vórðu tiknar av veiðuni, umframt magar til at kanna føðina.

Jan Arge Jacobsen
*Magnus Heinason* 8/4 2014




**Mynd 1.** Siglingarleiðin (svartar strikur), CTD støðir (gulir sirklar) og trolstøðir (grønir sirklar) hjá *Magnus Heinasyni* á svartkjaftatúrinum 1410, 27/3-9/4 2014.




**Mynd 2.** Ekkóvirðir av svartkjafti ($s_A$ mm/nm$^2$) sunnan fyri Føroyar á túri 1410, 27/3-9/4 2014. Nøgdin er víst sum sirklar, har støddin á sirklinum vísir, hvussu nógv av svartkjafti stóð undir skipinum.




**Mynd 3.** Ekkóvirðir av svartkjafti pr. hagtalspunt (0.5x1 gradir) sunnan fyri Føroyar á túri 1410, 27/3-9/4 2014.




**Mynd 4.** Longdarbýti av svartkjafti í føroyskum øki og norðara parti av ES-økinum á túri 1410, 27/3-9/4 2014.




**Mynd 5.** Miðalvekt (g) av svartkjafti í kanningarøkinum fyrst í apríl 2014.




**Mynd 6.** Hitin (°C) í vatnskorpuni á túri 1410, 27/3-9/4 2014.